# Bara Fróði er eftir

EIN NÝGGJ FLØGA. EIN **NÝGGJUR** BÓLKUR OG EITT NÝTT NAVN. TAÐ EINASTA, SUM ER EFTIR AV FRÓÐA, ER FRÓÐI. SOSIALURIN HEVUR HITT **23 ÁRA GAMLA** ARGJAMANNIN TIL EITT PRÁT UM **TÓNLISTARLIGA** LÍV HANSARA, TÝDNINGIN AV AT SLEPPA AT **BULDRA** VIÐ TRUMMUM Í KJALLARANUM HEIMA VIÐ HÚS, TÁ HONUM LYSTI, UM AT HAVA EIN **STUDENTASKÚLASANG** HANGANDI YVIR HØVDINUM OG EISINI SPURT HVÍ, **NÝGGJA FLØGA** HANSARA HEVUR EITT SO LANGT HEITI



**INTERVIEW**
**RÓLANT WAAG DAM**
rolant@sosialurin.fo

»Patience is a motherfucker when you are living life in slow motion« Einki minni enn tað! Heitið á fløguni telur 12 orð og tað longsta av teimum er so ljótt, at eg ikki fari at umseta tað til føroyskt.

– Ein sangur á fløguni eitur júst soleiðis, og eg haldi eisini, at Patience is a motherfucker when your are living life in slow motion sigur eitt sindur um hinar sangirnar á fløguni, greiðir Fróði Hansen frá.

Ein av styrkunum við argjamanninum – ja, tað er umráðandi, at hann er argjamaður, tí, sum hann sigur, so er hann fanime ikki havnarmaður – er, at hann ikki pakkar tingini inn. Tey verða søgd júst soleiðis sum tey eru, og soleiðis sum Fróði upplivir tey.

Eitt gott dømi um hetta, er nýggja heitið á bólkinum. Á fyrstu fløguni og konsertunum aftaná, kallaði Fróði Hansen bólk sín fyri Fróði. Nú kallar teir seg fyri Fróði & The Pink Slips.

– Og Pink Slip skal ikki skiljast sum nøkur fisa, ger Fróði greitt beinanvegin og so kemur sjálv frágreiðingin:

– Ein Pink Slip er eitt slag av uppsagnarseðli og hóast hinir limirnir í bólkinum eisini eru partur av navninum nú, so skal eingi ivi vera um, at eg eri diktator í bólkinum og kann siga teir upp til eina og hvørja tíð, sigur Fróði ikki sørt speiskliga.

At nýggja navnið verður tikið í brúk í samband við nýggju fløguna markerar onkursvegna eisini, at talan er um ein nýggjan bólk. Allir tónleikararnir uttan frontfigururin sjálvur, eru skiftir út í mun til fyrstu fløguna.

Nýggja navnið staðfestir eisini, at bólkurin Fróði er meira enn bara tann tónleikarin, sum hevur høvuðsleiklutin á pallinum.

– Eg føldi, at tað ikki var rætt, bara at kalla bólkin FRÓÐI. Vit eru ein bólkur og tað snýr seg um so øgiliga nógv meira enn bara meg. Tónleikurin og tónleikararnir fylla nógv á pallmyndini, og eg fari ofta av pallinum og standi millum áhoyrararnar og lurti, meðan hinir tónleikararnir koyra á við solo'um og hvørt av sínum, fortelur Fróði, sum annars heldur uppá, at tað er rein tilvild, at pink gongur aftur hjá honum.

Fróði Hansen var nevniliga sangari og trummusláari í bólkinum Moby The Pink Pilot, og nú eisini frontfigurur í Fróði & The Pink Slips, samstundis sum Bárður Dal Christiansen hevur gjørt húsarnar til báðar fløgur hansara – og er tað nakað, sum eyðkennir listina hjá Bárði Dal Christiansen, so er tað liturin pink, sum er afturvendandi í nógvum av verkum hansara.

– Og so er Pink Floyd eisini tann bólkurin, mær dámar best av øllum, men tað er altso tilvild alt hetta her, flennir Fróði.

## Mánamorgun hongur enn

Tað var við at vinna FM 08 at Fróði Hansen fekk sítt gjøgnumbrot á føroyska tónleikapallinum. Hetta gjørdi hann við bólkinum Moby The Pink Pilot. Men sambært Fróða sjálvum, so er hesin bólkurin ikki virkin.

– Er tað ikki soleiðis man sigur? Tann bólkurin er í øllum førum ikki virkin yvirhøvur, ger Fróði greitt. Men hóast sína stuttu livitíð, so vann bólkurin, sum sagt, áðurnevndu tónleikakapping í 2008, teir vóru eisini í studio og tóku upp og spældu bæði á G! og Summar Festivalinum.

Men hóast Fróði síðani hevur spælt við í tveimum øðrum bólkum, givið eina fløgu út og tann næsta er á veg, so er tað ikki ein sangur hjá Moby The Pink Pilot, Fróða ella Fróða & The Pink Slips, ið fólk altíð spyrja eftir til konsertir hansara.

– Eg havi ein Mánamorgun hangandi yvir mær, og tað verður altíð spurt eftir honum. Og nei, eg fari ikki at spæla hann inni á The Rock, tá onkur rópar tað. So mugu vit heldur finna gittaran fram á morgunballinum aftaná, so er tað einki problem, flennir Fróði.

Mánamorgun var ein verkætlan frá Studentaskúlatíðini, har hann og floksfelagarnir, sum høvdu tónleik, gjørdu ein sang og eitt videolag. Tannbust Band róptu tey bólkin, lagið varð nógv spælt í útvarpinum og var næstbest dámda lagið í 15 teimum bestu í 2007. Á youtube.com og á myspace-síðuni hjá Tannbust Band er sangurin spældur tilsamans 25000 ferðir. Fróði sang og spældi trummur á hesum sangi, eins og tað eisini var hann, ið gjørdi lagið.

## Meira rockur

Í mun til Mánamorgun var fløgan Creeping Storm rættiliga rockutt. Sambært Fróða verður Patience is a motherfucker when you are living life in slow motion eitt vet harðari enn henda.

– Tað er rockur, vit spæla. Til tíðir er tað øgiliga Pink Floyd-inspirerað. Men henda fløgan verður kanska meira rockutt enn hin, meira nossir í og kanska eitt sindur harðari.

Ein annar munur er eisini, at nýggja fløgan er ein EP við seks løgum. Orsøkin er tó ikki vantandi tilfar.

– Tað einasta, sum mær ikki vantar, er tilfar. Tað er bara ein spurningur um fígging, og nú høvdu vit so pengar til eina EP, sum er munandi bíligari at geva út enn ein heil fløga, greiðir Fróði frá.

– Og nú vildi eg eisini koma út við onkrum nýggjum, leggur hann aftrat. Úrslitið er fýra enskir sangir og tveir føroyskir, har sangurin Tíð lekir øll sár ber til at hoyra á myspace-síðuni hjá bólkinum.

Fróði hevur í stóran mun skrivað tekstir á enskum, men hevur tó roynt seg onkuntíð fyrr á føroyskum.

– Nú er tað ofta á føroyskum, eg skrivi. Føroyskt hevur eina erligheit yvir sær, sum eg ikki haldi enskt hevur, heldur Fróði, sum kortini ikki heilt dugir at siga hví, hann annars yrkir á enskum.

– Øll mín inspiratión stavar frá enskum og alt, sum eg lesi, er á enskum. Men hvør veit, tað næsta, eg gevi út, verður kanska á donskum, skemtar Fróði.

Hóast tað neyvan verður til nakað, so dylir Fróði ikki yvir, at hann er sera fegin um at spæla í Danmark. Av tí sama er bólkur hansara eisini sera virkin.

– Í Danmark fært tú nýggjar møguleikar allatíðina. Í Føroyum er beinanvegin so, at tað er tað sama umaftur og umaftur. Har kann eg eisini vera fullvísur í, at eg kenni ein stóran part av áhoyrarunum. Tað geri eg ikki, tá eg spæli í Danmark og tað leggur eisini eitt annað trýst á okkum, sum spæla, fortelur Fróði,

## Frá kjallara til Rust

Fróði er vaksin upp við tónleiki allastaðni kring seg. Vildi illa til, hevði hetta verið við til at lagt eitt keðiligt trýst á Fróða, um at hann skuldi spæla. Hetta hevur tíbetur ongantíð verið skilið heima hjá Fróða og teimum.

– Tvørturímóti haldi eg, at eg havi verið sera heppin. Eg eri altíðsloppin at spæla, tá eg vildi, eisini trummur klokkan ellivu um kvøldið, um tað var tað, eg hevði hug til. Tað hevur virkuliga verið gott hjá mær, heldur Fróði Hansen.

Úrslitið av øllum ganginum í kjallaranum á Argjum, kunnu føroyingar enn einaferð uppliva, nú Frói kemur út við síni næstu fløgu. Útgávukonsertin verður á G! fríggjadagin um eina viku, og tveir mánaðir seinni verður útgávukonsert í Danmark, tá Fróði & The Pink Slips spæla á Rust í Keypmannahavn 16. september.